# Hvar er summarveðrið?

Higartil hevur tað verið lítið vit føroyingar hava merkt til summarið her heima. Á flatlondum er veðrið av tí allar besta seinastu dagarnar fyri ikki at siga vikurnar, og er hitin lopin upp um tey 30 hitastigini onkran dagin.
Í Føroyum hava vit havt onkran dag við góðum veðrið nú og tá, men fáir samanhangandi dagar við góðveðrið og sól hava verið. Í gjár, sunnudagin, var veðrið sera gott kring stórar partar av landinum, og eisini í dag skínur sólin, hóast hitin ikki er tann sami. Í morgin verður turt og kanska sólin sær fram, men so eru eisini turra kvotan uppbrúkt.
Mikudagin, hósdagin, fríggjadagin og leygardagin fáa vit sirm ella regn, so tað sær ikki út til, at ein kann mála garð ella hús í vikuni. So er brennandi spurningurin nær góða veðrið av álvara fer at inntaka oyggjarnar. Fyribils mugu vit so taka til takkar við summarsligum hita, sum í morgin verður millum 15 og 18 stig, og í morgin fer hitin onkrastaðni at koma upp á 20 stig.






















## Hevur tú tryggjað børnini?

Øll tryggja sær húsini. Bilurin má tryggjast. Og báturin... Men hvussu er við børnunum? Eru tíni børn tryggjað?
Ein barnavanlukkutrygging fevnir um líkamsskaðar á tíni børn, elvdir av vanlukku. At barnið fær varandi mein er ein sorgarleikur í sær sjálvum, men harafturat kann tað verða ein fíggjarligur smeitur fyri familjuna. Hesum tryggjar vanlukkutryggingin ímóti.
Vit bjóða nú øllum børnum undir 18 ár ókeypis vanlukkutrygging tað fyrsta árið. Og tey næstu árini kostar hon eina ávísa upphædd um árið, sum er tann sama uttan mun til, hvussu nógv børn tú eigur.
Barnavanlukkutryggingin er galdandi alt samdøgrið. Bæði í heiminum, úti í spæli og í skúla.




www.sansir.fo
Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari